# Pensjónin skal upp

JAN HØJGAARD



Eitt av mínum fremstu málum sum formaður í Fiskimannafelagnum verður at framtíðartryggja sjófólkið. Tí skulu vit hava hægri pensjón og eina nýggja pensjónsskipan í fiskimannafelagnum.

Eftirlønin hjá sjómonnum er ikki komin undir land enn, men arbeitt verður við spurninginum. Eftirlønin hjá okkum er í løtuni 70 kr um dagin, men eg haldi tað gerst greiðari og greiðari fyri allar okkara limir, at hetta er alt ov lítið. Jú fyrr vit byrja at spara upp, tess meir verður til okkara, tá ið vit gerast pensjónistar.

Tað er ikki nóg gott at fáa 70 kr fyri hvønn mynstraðan dag í pensjón. Vit mugu leggja pensjónina um til eitt %-gjald, sum so líðandi skal hækka til eini 15%.

Eg kundi hugsað mær, at vit til komandi sáttmálasamráðing fingu gjørt eina langtíðaravtalu um pensjónina, soleiðis at tær 70 kr verða umroknaðar til % - t.d. gerast 5%, og at pensjónin so veksur við 1-2% um árið, til hon er eini 15%–16%.

**Framtíðartryggja sjófólkið**

Endamálið við pensjónini er at framtíðartryggja sjófólkið og familjur teirra, soleiðis at okkara limir ikki vera verri fyri, tá ið vit gerast pensjónistar.

Eg haldi tað er í lagi, at vit rinda nakað av pensjónini sjálvi – tað gera fleiri onnur feløg eisini – men vit skulu ikki rinda alla pensjón sjálvi. Eitt rímuligt býti hevði verið 25% til okkum og 75% til reiðaran.

Sum eg eisini nevndi á landsfundinum, so er mítt uppskot, at okkara limir rinda 4% í eftirløn og reiðarin rindar 12% í eftirløn.

Sum felag mugu vit hugsa um, hvussu vit best kunnu røkja pensjónsáhugamálini hjá sjómonnunum, og tí eru vit í ferð við at kanna, hvørja skipan limirnir skulu hava framyvir. Framtíðar pensjónslóggávan fer eisini at seta ymisk krøv til pensjónina, so tað er greitt, at vit kunnu ikki halda fram við 60'ara kontunum, sum vit hava í dag.

1. januar í 2011 skulu vit í Føroya Fiskimannafelag hava eina nýggja pensjónsskipan fyri limir okkara – hetta verður eitt av mínum fremstu málum at fáa avgreitt í 2010. Arbeiðið er longu byrjað.

# Hvussu ringt skulu pensjónistarnir hava tað, áðrenn Sambandsflokkurin er nøgdur????

ANNITA Á FRÍÐRIKSMØRK



Tað er ófatiligt, at flokkurin, sum dagliga heldur verjurøður um tryggleikan í ríkisfelagsskapinum, fer so lætt um tryggleikan hjá teimum gomlu!

Ella er tað nú so ófatiligt? Er tað ikki júst neyðuga avleiðingin av, ikki at vilja taka við ábyrgd!

Tað hevur í øllum førum ikki verið mánaður, síðani ABC samgongan kom til, at Sambandsflokkurin ikki er komin við uppskotum um at taka frá teimum gomlu, og fingið tey samtykt við hjálp frá Fólkaflokkinum og Javnaðarflokkinum:

Er tað ikki í sambandi við dagtilhaldini, sum skulu missa sína játtan, so eru tað pensjónirnar, sum skulu lækka ella gjald fyri heiligvágin, sum skal hækka, ella gjald fyri uppihald á sambýlum sum skal hækka.
Osfr.

Tað tykist sum at samgongan, í hesum føri við Sambandsflokkinum á odda, eina og aleina hevur kikaran vendan móti teimum gomlu, og teimum onkursvegna fíggjarliga illa fyrikomnu borgarum okkara.

**Sparið heldur har, sum sparast skal!**

Um tað nú var so, at onki annað reiður var at fara eftir pengum, so var tað tað! Men so er ikki. Fíggjarlógin er fylt við bygnaðartrupulleikum, sum sambært búskaparráðnum fyllir helvtina av fíggjarlógarhallinum. Og tey gomlu eru altso ikki ein partur av hesum bygnaðartrupulleikum! Tað eru heilt aðrar kontoir sum skapa fíggjarlógarhallið, og sum tí mugu rættast! Men samgongufólk bera seg undan, og siga seg ikki kunna semjast um at gera nakað við hesar trupulleikar.

Gud viti, hvat tað so er, sum fær alla samgonguna viku eftir viku at verða samda um, at umstøðurnar hjá teimum gomlu skulu skerjast, - og enntá uttan grundgevingar og uttan mál og mið!?

**Eins deyð er annans breyð!**

Fólkaflokkurin hevði mann ikki roknað við fór upp á barikadurnar í hesum máli. Men hvar er Javnaðarflokkurin? Er hann ikki merkiliga kúrrur í hesum døgum. Kann verða, at hann veit, at skal hann fáa tað betri í komandi veljarakanningum, so kann hann bara taka atkvøður frá Sambandsflokkinum. Tí ræður um hjá honum at lata Sambandsflokkin steikjast í sínum egna feitti til Javnaðarfloksins fyrimun. Hevði hann annars akt, sum hann hevur makt, - hann situr jú við fíggjarmálum! So hevði hann langa nevan í borið og forlangað virðiligari umstøður fyri tey gomlu. Men ikki eitt orð. Bara samtigandi tøgn!

Vísir kanska, hvussu nógv hægri tey virða Flokkin enn umstøður fólksins.

**Fullveldið gevur teimum gomlu virðiligar umstøður - Ríkisfelagsskapurin tekur frá teimum!**

Tá ið fullveldislandsstýrið sat, vaks pensjónin meira enn nakrantíð. Tað høvdu vit ráð til tá, tí vit høvdu eitt mál um at taka ábyrgd av okkara samfelagið og borgarum okkara. Vilt tú taka ábyrgd av samfelagnum ber ikki til at umganga ábyrgdina fyri teimum gomlu, og tí kom onki annað uppá tal tá.

Men so kom ABC til og settu fullveldið til viks. Úrslitið síggja vit m.a. hevur verið, at hesi ABCfólk, nú hava slept teimum gomlu upp á fjall. Eg veit ikki, hvat málið hjá ABC samgonguni er. Tað vita fjølmiðlarnir heldur ikki. Fakfeløgini heldur ikki. Og tað vita samgongutingfólk heldur ikki. Tey flenna bara, tá ið man spyr tey! Tú, sum lesur hetta lesarabrævið kanst royna teg, við at spyrja onkran í ABC samgonguni, hvat endamálið er við ABC-samgonguni.

Vilt tú ikki hava ábyrgd av samfelagnum, megnar tú heldur ikki at stýra við ábyrgd.

ABC samgongan er gott dømi um tað! tí mugu teir politikkarar framat, sum vilja seta ábyrgdina á skránna aftur. Tástani fært tú ein politiskan myndugleika, sum eisini tekur ábyrgd av teimum gomlu.

# Ránsmenn á ferð

JÓGVAN ARGE



Fylgjurnar av nýggju fíggjarlógini koma nú javnt og samt undan kavi.

Skula vit meta eftir gongdini seinast, so verða eini ræðutíðindi fyri og onnur eftir at frætta komandi vikurnar og mánaðirnar.

Nú kom upp, at eldra fólkið á sambýlum skal rinda ikki minni enn 2000 krónur meir um mánaðin fyri innivst og mat.

Rokningin hjá hesum gomlu hækkar úr 3500 krónum upp í 5.500 krónur í einum høggi frá 1. februar.

Hetta verður gjørt fyri at bøta um landsins fíggjarlóg.. Annars hevði hendan tænastan verið skerd, sigur almannaráðharrin Rósa Samuelsen.

Mær er farið at tykja so hjartaliga synd í Rósu Samuelsen.

Tað sær ikki mætari út enn, at hon er vorðin tann ævigi syndabukkurin fyri samgonguflokkarnar og løgtings- og landsstýrisumboðini úr flokkunum trimum.

Skula nøkur oyru sparast ella takast inn, so verður Rósa spent fyri hestin, og hon skal eisini út á vígvøllin at forklára politikkin hjá eini samgongu, sum ongan politikk tykist hava yvirhøvur.

Virksemið hjá samgongu og løgtingi í løtuni kann allarbest lýsast við einum orði: ránsmannavirksemi. Tey gera ikki annað enn ræna pengar frá fólki, stovnum og kommunum.

Løgtingið og landsstýrið megna als ikki at fíggja sítt egna barn, føroyska samfelagið, men fyri kortini at fáa ráð til ekstravagansu fara tey í lummarnar hjá teimum veikastu í samfelagnum og tøma teir við beráddum huga.

Púra óskiljandi, at Rósa ikki langtsíðani havt lagt frá mær og latið til dømis Johan Dahl sloppið at tømt lummarnar hjá fólki.

Tá onki er eftir í einstaklingslummunum, verður hálsað um. Tá verður ein stovnur fyri og annar eftir stolin úr Havn og fluttur út á bygd eftir einari nátt, so skattainntøkurnar hjá viðkomandi bygdakommunu kunnu økjast.

Hetta hevur verið lagið í fleiri ár, og ongi útlit eru til nakran bata. Seinasta sniðálopið er, at tann hart royndi Vinnuháskúlan skal skrykkjast upp við rót og flytast í onkran útjaðara. Tað stendur í fíggjarlógini.

Vit hava eisini verið vitni til, at tá tingið ikki hevur fleiri pengar at reka síni egnu børn fyri, so langar tað fleiri børn saman í eitt. Útvarpið og sjónvarpið eru dømi um tað. Úrslitið var, at ikki bara annar, men báðir, fóru av knóranum.

Í áravís hava landsstýris- og tingfólk jabbað um at leggja málsøkir út til kommunurnar. Skúlin og eldraøkið skula liggja fremst fyri, men hetta gongur ongan veg.

Tað mest syrgiliga við hesum ætlanum er, at tað er ikki fyri tey bláu eyguni hjá kommununum og borgarunum, at landspolitikarnir vilja leggja málsøkini út. Endamálið er eittans, og tað er at sleppa landskassanum undan at gjalda fyri skúla og eldraøki.

Tá kommunurnar hava fingið málsøkini tveitt í føvningin, stendur tað til teirra at fíggja økini, tí landið hevur langtsíðani brúkt teir pengarnar, sum tað av røttum átti at spjaðað til við.

Tá hava eyðrænararnir á tingi sloppið sær undan ábyrgdini, og kommunurnar sita eftir við apuni – og hava bara eitt stað at fara eftir pengunum. Tað er ikki ringt at rokna út, hvar tað er..

Nei. Her verður onki skil á, so leingi landsins kosnu bara hugsa um egið gagn og leggja líka í borgaranna og landsins frama.

# Enn einaferð!!!!

JÓNA MORTENSEN



Havi ikki orð fyri hvussu hørm eg eri um viðferðina av okkara gomlu; ómenniskjasligt og kalt.

Somu persónar, sum í vallyftunum skrivaðu um, at fólkapensiónistar skuldu tryggjast eina góða og rímiliga fólkapensión, sum skuldi verða á hædd við tær bestu í Norðanlondum, himprast nú ikki við, frá einari løtu til aðra, at minka um nýtslupeningin hjá hesum gomlu við 2.000 krónum um mánaðin- ella verður eingin tænasta verður sagt. Hatta kann man ikki!!!

4 milliónir máttu verið at funnið hjá øðrum samfelagsbólki á fíggjarlógini. Haldi ikki at tað líkist nøkrum at tað so mikið verður hugsað um at gera livikorini hjá okkara gomlu verri enn tey eru, -tað átti ikki 'eingang at komið upp at vent'. Eitt er heilt vist, henda sparda upphæddin ger lítlan mun í okkara risastóra halli.

Og okkara eldru eiga ikki at straffast fyri nakað hall !!! tí tey eiga tað ikki, - tey hava strevast alt lívið og hava gingið høgt uppí, ikki at skylda nøkrum nakað .

Vit sóu eisini í sjónvarpinum, at tey ikki kendu seg rímiliga viðfarnan.

Eitt uppskot um hvussu hesar 4 milliónirnar kundu fingist til vega, er t.d. posturin á fíggjarlógini sum eitur 'afturgjald til pápar fyri part av goldnum barnapeningi'- mítt uppskot er, at hevur pápin eina inntøku yvir eitt vist, t.v.s. eina góða inntøku, so verður henda afturbering strikað. Spyrt tú mammuna, so eru tingini ikki rímilig har, í hvønn mun foreldrini uppihalda barninumvinaliga kannið henda og aðrar møguleikar við tí fyri eyga,at fáa hesar 4 milliónirnar, sum ætlanin er at taka frá okkara gomlu.

Við vón um at henda ætlan verður endurskoðað....